*VESTMANNA BYGDARRÁÐ*

Viðtøkur fyri Vestmanna Bygdasavn.

1. grein
Vestmanna Bygdasavn verður skipað sum kommunalur stovnur og er ogn Vestmanna Kommunu.

2. grein
Endamál savnsins er innan Vestmanna Kommunu at savna, skráseta, varveita og framsýna gripir, sum hava siðsøguligan áhuga og savna frásagnir um nýtslu og søgu teirra og at skráseta, varveita og umsita føst fornminni.

3. grein
Savnið verður umsitið av mentamálanevndini, sum hevur ábyrgdina av rakstrinum og hvussu inntøkurnar verða nýttar. Mál savninum viðvíkjandi verða viðgjørd á vanligum nevndarfundi, við tilmæli til bygdarráðið til samtyktar.

4. grein
Bygdarráðið setur savnsleiðara, sum við hjálp og leiðbeining frá landsantikvarinum og undir eftirliti hansara tekur sær av viðurskiftum savnsins.

Samsýning savnsleiðarans verður ásett av bygdarráðnum og somuleiðis samsýning til hjálparfólk, sum savnsleiðarin í samráð við bygdarráðið tekur sær, tá neyðugt er.

5. grein
Virksemi savnsins verður fíggjað av bygdarráðnum, við ymsum studningi og við studningi úr landskassanum sbr. LL nr. 17 frá 9. mai 1972 um bygdasøvn við mentunarsøguligum virksemi.

6. grein
Fíggjarárið gongur frá 1. apríl til 31. mars

7. grein
Savnsleiðarin førir roknskap savnsins, soleiðis, at altíð er lætt at síggja, hvussu fíggjarstøðan er.

Roknskapurin verður grannskoðaður av grannskoðara bygdarráðsins og, tá hann er góðkendur av bygdarráðnum, sendur landsantikvarinum við frágreiðing og skjølum innan 1. juni. Samstundis sendir bygdarráðið eftir uppskoti savnsleiðarans landsantikvarinum rakstrarætlan fyri komandi fíggjarár.

8. grein
Í øllum førum verður farið fram eftir tí sum fyrisett í LL nr. 17 frá 9. mai 1972 um bygdasøvn við mentunarsøguligum virksemi.

Soleiðis samtykt á fundi í Vestmanna Bygdarráði tann 21. juni 1982.

VESTMANNA BYGDARRÁÐ, 28. januar 1983.

B. v.
Símun Símonsen
form.

Søkt verður um góðkenning av frammanfyrinevnda bygdasavni sum stuðulssøkjandi stovnur.

VESTMANNA BYGDARRÁÐ, 28. januar 1983.

B. v.
Símun Símonsen
form.